## Balling skoraði aftur

Ulrik Balling ger sítt til, at tað skal ganga betur hjá Vejle í superliguni. Vejle er botnlið og hevur bert fingið eitt stig higartil í ár. Sunnudagin spældi Vejle ímóti Viborg, sum eisini hevur havt trupulleikar, og Viborg vann dystin 2-1. Viborg legði seg á odda 2-0, áðrenn Vejle svaraði aftur. Málið hjá Vejle skoraði Ulrik Balling, sum hevur hevur spælt fyri NSÍ. Balling hevur nú skotið fimm mál í superliguni í ár.

## Stóri og Laudrup vunnu

Lyngby vann hóskvøldið finaluna um Sælandsmeistaraheitið fyri old-boys lið. Lyngby spældi ímóti Næstved og vann 6-2 eftir umdyst. Ein av spælarunum á liðnum hjá Lyngby er fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin Henrik Larsen. Hann spælir á liði saman við millum annað Michael Laudrup, Allan Nielsen, Peter Nielsen, Morten Wieghorst og Bent Christensen. Henrik Larsen skoraði tvey av málunum hjá Lyngby, sum nú skal spæla um DM fyri old-boys.



VB/Sumba-NSÍ 2-0 (2-0):

# VB/S treiskast í botninum

*VB/S*

*NSÍ*

**NSÍ hevði bóltin nógv, men skapti lítið. VB/Sumba tók sín kjans, skoraði tvey mál í fyrra hálvleiki og er nú rættiliga á lívi í stríðnum um at sleppa undan niðurflyting**



*VB/Sumba hevur fingið nýtt lív í botnstríðnum, eftir at liðið í gjár vann heimadystin ímóti NSÍ*

**VB/S-NSÍ**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Botnliðið VB/Sumba fangaði NSÍ á skeiva beininum og vann dystin í Vági sunnudagin.

VB/Sumba stríðist ein harðan kamp við B68 og ÍF um at sleppa undan niðurflyting, og í gjár var tað Suðuroyarliðið, sum var omaná. Bæði B68 og ÍF taptu sínar dystir, og so streyk VB/Sumba fram um tey áðrenn seinata dystin leygardagin.

NSÍ er mest sum givið fyri í ár. Eftir at liðið tapti toppdystirnar fyri B36, HB og EB/Streymi herfyri, hevur liðið valla klárað at manna seg veruliga upp aftur. Seinastu átta dystirnar hevur NSÍ bert fingið fýra stig, og teir hava tapt seks av hesum átta dystum.

Nú er vónin um heiðursmerki farin, og tað verður eisini trupult hjá liðnum at vinna sær europeiska luttøku næsta kappingarár.

### Skoraðu tvær ferðir

Dysturin í Vági sunnudagin myndaði seg soleiðis, at NSÍ hevði bóltin nógv, men teir skaptu fáar veruligar málkjansir. VB/Sumba fekk nakrar kjansir, og teir tóku sínar kjansir.

Tá ið 14 minuttir vóru spældir var tað VB-toppskjúttin, Birgir Jørgensen, sum enn einaferð sló til. Hann hevur boðað frá, at hann gevst at spæla fótbólt eftir hetta kappingarárið, og tí var hetta seinasti heimdysturin hjá honum í Vági. Tað markeraði hann við at skora. Jón Krosslá Poulsen spældi bóltin inn um verjuna, Birgir var fyrstur á bóltinum, dró upp á tvørs og sendi í málið til 1-0.

Tá ið slakur hálvur tími var spældur, var tað verjuspælarin Karl Lisberg, sum økti til 2-0. Hann fekk bóltin nakað frammanfyri miðjuna, eftir hornaspark, hann dró eitt sindur og smekkaði til úti frá. Bólturin streyk beint í málið til 2-0.

Hetta var eisini hálvleiksstøðan, og teir á heimaliðnum vóru sera væl nøgdir við leiðsluna, og restina av dystinum var dentur lagdur á at verja hesa leiðslu.

### Skaptu ov lítið

NSÍ hevði bóltin nógv meira enn VB/Sumba í dystinum, og serliga í seinna hálvleiki royndi NSÍ at trýsta heimaliðið. VB/Sumba kom eisini at standa nógv í verjustøðu, men teir vardu væl, og NSÍ var í stórum løtum mest sum í tómgongd. Liðið spældi bóltin nógv runt, men teir skaptu fáar kjansir.

NSÍ-venjarin royndi at gera onkrar skiftingar og koyra á sínar menn, men tað var heimaliðið, sum fekk tann størsta kjansin í seinna hálvleiki.

Hetta var, tá ið ein vældømandi Petur Reinert bríkslaði fyri brotsspark til VB/Sumba. Birgir Jørgensen varð settur a skjóta, men tann vanliga tryggi skjúttin, smekkaði bóltin upp um málið. Hendan dagin hevði VB/Sumba ráð at brenna brotsspark, tí NSÍ fekk ongantíð hol á, og VB/Sumba vann tí dystin 2-0.

## Stórur innatsur

VB/Sumba-venjarin Bjarni Johansen fegnaðist eftir dystin sunnudagin um sigurin hjá sínum liði, og hann rósti spælarunum fyri ein stóran innsats.

- Tað var trýst á okkum, men tað hevur tað verið so nógvar dystir í ár, og hesaferð góvur spælararnir seg meira enn hundrað prosent, segði hann.

- NSÍ hevur nógv spæl og onkrar kjansir, men málini telja, so tað var uppiborið, at vit vunnu dystin.

Hetta má geva spælarunum vón um, at vit fara at klára at verða verandi í Formuladeildini. Við hesum innsatsinum trúgvi eg upp á, at vit fara at klára tað, seðgi Bjarni Johansen.

## Skaptu ov lítið

Miðvallarspælarin hjá NSÍ, Jústinus R. Hansen, helt eftir dystin, at hansara lið hevði fingið ov lítið burturúr.

- Vit spæla, og teir fáa málini. Tað hendi ov lítið hjá okkum, og hóast vir royndu at trýsta í seinna hálvleiki, so skaptu vit ikki tað stóra, sigur hann.

- VB/Sumba hevði helst meira at spæla fyri enn vit, og teir vóru nakað grammari. Teir fingu eisini mál upp á onkrar av sínum kjansum, og tí var tað uppiborið, at teir vunnu dystin. Vit høvdu fjórða pláss at stríðast fyri, men tað er farið nú, sigur Jústinus R. Hansen.

## Óli fekk skaða í rivjabein

NSÍ-álopsspælarin Óli Hansen noyddist av vøllinum tíðliga í seinna hálvleiki við einum skaða. Hann fekk eitt slag í rivjabeinini, og líkt er til, at eitt rivjabein er brákað ella brotið. Óli spælir tí ikki seinasta dystin hjá NSÍ, sum verður ímóti B68 leygardagin.